# Margit søkti Víking

**KVINNUFÓTBÓLTUR** AB og KÍ vunnu sigrarnar, roknast kundi við, men í dystinum millum B36 og Víking gjørdist Margit Magnusdóttir stóri spælarin, tá hon skjeyt øll málini hjá B36, sum eitt sindur óvæntað vann



**B36 BJÓÐAR AV**

*Við 4-3 sigri á Víkingi vístu uppflytararnir úr B36 í gjár, at kappingin um at renna aftan á AB og KÍ kann gerast harðari, enn mong høvdu væntað frammanundan*

Mynd: Álvur Haraldsen

Hilmar Jan Hansen

Tað er neyvan ov nógv avgjørt at siga, at spælið hjá B36 higartil hevur verið heldur trilvandi, men tá Víkingur vitjaði í Gundadali í gjár, lá munandi betur fyri. Og serliga var tað tann eini spælarin, ið skaraði framúr, tí tá góður hálvur tími var farin, hevði Margit Magnusdóttir skotið reint »hat-trick«, og fyri hálvleik hevði hon skorað eitt aftrat, so B36 var á odda 4-1. Hóast Sevdal-systrarnar skutu trý mál fyri Víking, rakk tað ikki til at taka B36, sum við sigrinum kom upp á triðjapláss í kappingini.

Kappingin millum tey bæði fremstu síðstu tvey árini, AB og KÍ, tykist aftur í ár vera beinhørð, og í løtuni er tað bara málúrtøkan, ið ger av, hvat av liðunum er tað fremra. Av tí at AB í grannauppgerð vann 5-0 á HB í gjár, er tað AB, sum í løtuni eigur oddasessin í landskappingini. AB hevði eina rúgvu av næskum royndum og skuldi vunnið nógv meira, men Ásleyg Súnadóttir rakti málið væl og fekk skotið trý av teimum fimm málunum hjá AB.

Hóast AB eigur oddasessin, læt KÍ ikki argjakvinnur fara langt, tí bara eittans málið er á muni í málúrtøku. KÍ var eisini á útivølli og vann 3-0 á Skála í einum dysti, har tað eisini var KÍ, sum hevði munin og kundi vunnið meira. KÍ var longu á odda 2-0 eftir eitt lítið korter, men triðja málið kom ikki, fyrr enn bara eitt korter var eftir.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**Føroyska 1. Deild *kvinnur***

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 5 | 4 | 1 | 0 | 20 | 3 | +17 | 13 |
| 2 | KÍ | 5 | 4 | 1 | 0 | 18 | 2 | +16 | 13 |
| 3 | B36 | 5 | 2 | 1 | 2 | 6 | 12 | -6 | 7 |
| 4 | Víkingur | 5 | 1 | 1 | 3 | 13 | 14 | -1 | 4 |
| 5 | Skála | 5 | 1 | 1 | 3 | 4 | 11 | -7 | 4 |
| 6 | HB | 5 | 0 | 1 | 4 | 1 | 20 | -19 | 1 |

# FC Suðuroy einsamalt á odda

**FÓTBÓLTUR** Av tí at AB tapti og TB bara fekk javnt, kundi FC Suðuroy við sigri leggja seg einsamalt á odda í næstbestu mansdeildini

Hilmar Jan Hansen

Framvegis eru suðuroyarliðini bæði, FC Suðuroy og TB, best fyri í kappingini um uppflyting, har AB í løtuni bara dragnar. Enn er kappingin tó komin ongan veg, so myndin kann saktans broytast, men tá fyrsti triðingurin er farin aftur um bak, fer ein tendensur helst at vísa seg.

Málríkasti dysturin hetta umfarið í Vági, har FC Suðuroy tók ímóti teimum næstbestu hjá EB/Streymi. Her fingu gestirnir ein sjokkstart, og eftir bara hálvum tíma hevði Jónstein Magnussen skotið trý mál, so EB/Streymur var á odda 3-0! Hetta var støðan eitt lítið korter inn í seinna hálvleik, men so megnaði FC Suðuroy væl og virðiliga at svara aftur, og David Asare gekk undan við einum »hat-trick«, so suðuroyingarnir endaðu við at vinna 5-3.

Hitt suðuroyarliðið, TB, fekk heldur ikki nakra ynskibyrjan á Skála, tí beint fyri steðgin legði Brian Jacobsen heimaliðið á odda 1-0, og tann støðan helt sær í 12 minuttir av seinna hálvleiki, til Bárður Dimon fekk javnað. Eitt sindur av dramatikki var ímóti endanum, tá málskjúttin hjá Skála fekk sítt seinna gula kort og mátti av vøllinum – saman við Dmitrije Jankovic og Dan Mortensen hjá TB, ið báðir fingu reyða kortið!

## AB fall í Gundadali

Argjamenn skuldu verið førir fyri at kappast við suðuroyarliðini um uppflyting, men tað gongur ikki betur enn næstbest hjá AB fyri tíðina. Leygardagin taptu argjamenn aftur, og hesa ferð vóru tað teir næstbestu hjá HB, ið spentu bein. Einsamalla málið í dystinum skoraði Magnus Egilsson við einum vælplaseraðum skoti í 12. minutti, og so komu ikki fleiri mál í grannauppgerðini í Gundadali.

Grannauppgerð var eisini við Løkin, har NSÍ tók ímóti Víkingi, og her var tað heimaliðið, ið hevði munin og vann 3-0. Rógvi Højgaard skoraði í fyrra hálvleiki, og eftir steðgin skutu Hugues Namni og Nemanja Koncar hvør sítt mál.

FC Hoyvík, ið óivað hugsar um at sleppa longur upp at spæla, hevur ikki rættiliga havt vindin við sær, tí útisigurin á 07 Vestur í gjár var tann fyrsti hjá hoyvíkingum hetta kappingarárið. Einki mál kom í fyrra hálvleiki, men 10 minuttir eftir steðgin fekk Bogi á Borg Eyðunsson fatur í einum returbólti og legði FC Hoyvík á odda. 12 minuttir seinni var Ragnar Niclasen á rætta staðnum eftir trunkaspæl, og so var 1-1. Men eitt lítið korter fyri dystarenda vísti gamli málrevurin, Jørgen Meitilberg, sítt virði, tá hann við góðum skoti úr 15 metrum tryggjaði FC Hoyvík sigurin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**Føroyska 1. Deild *menn***

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC Suðuroy | 4 | 4 | 0 | 0 | 16 | 6 | +10 | 12 |
| 2 | TB | 4 | 3 | 1 | 0 | 15 | 3 | +12 | 10 |
| 3 | NSÍ II | 4 | 3 | 0 | 1 | 13 | 5 | +8 | 9 |
| 4 | EB/Streymur II | 4 | 3 | 0 | 1 | 12 | 7 | +5 | 9 |
| 5 | AB | 4 | 2 | 0 | 2 | 13 | 7 | +6 | 6 |
| 6 | HB II | 4 | 2 | 0 | 2 | 6 | 11 | -5 | 6 |
| 7 | FC Hoyvík | 4 | 1 | 1 | 2 | 7 | 12 | -5 | 4 |
| 8 | Skála | 4 | 0 | 1 | 3 | 3 | 10 | -7 | 1 |
| 9 | Víkingur II | 4 | 0 | 1 | 3 | 2 | 11 | -9 | 1 |
| 10 | 07 Vestur II | 4 | 0 | 0 | 4 | 4 | 19 | -15 | 0 |